

Hedvig hevur innrættað sær eitt málikamar í húsinum. Hendan myndarøðin av familjuni hongur í gongini. Hon hevur lært at mála hjá Kára Svensson, Billedskolen á Nørrebro, í Kunstskolen í Hillerød, og hevur eisini havt nakrar framsýningar.





slonk og sunn og kenna meg væl, bæði innan og uttan. Inni í sálini við at hava Harran hjá mær alla tíðina og hvønn dag, og uttaná við at vera rein og sunn og at lata meg pent í.

SKAPAR SJÁLV SÍTT RÁK

Nú vit tosa um at lata seg pent í, fer tosið yvir á klæðir og skógvar, tí Hedvig vil ikki bara fylgja rákinum ella mótanum.

– Eg vil helst finna eina djypri meining í øllum. Men samstundis dámar mær væl góðan stíl, móta, klæðir og innrætting. So eg geva meg yvir til tað kvinnuliga og pyntiliga. Helst ráar og romantiskar dygdarvørur.

Klæðini fær Hedvig ofta rós fyri, tí hon dugir væl at finna tað rætta og at seta tað pent saman. Tað eru góð merki, keypt í endurnýtslu ella outlet. Manglar hon eina hvíta skjúrtu, bíðar hon til tann rætta er funnin, og



so keypir hon hana. Á tann hátt kemur hon ikki heim við feilkeypum og vánaligari góðsku, men fær pengarnar at røkka til tað rætta.

Merkini, sum ganga aftur, eru Odd Molly, Diesel og Replay. Ofta keypt bíligað, seymað um ella á útsølu. Og so frískað upp við einum heimabundnum turriklæði, einum skinnvesti, persónligum tilhoyri, smúkkum og penum skóm.

– Tað besta komplimentið, eg havi fingið, var frá einari, sum segði: »Tú gongur altíð í sovorðnum, sum man ikki fær í handlunum«. Eg vil gjarna vera orginal, líka mikið, hvar eg búgvi. Ikki tí tað er modernað, men tí mær dámar tað. Tí eg elski at kenna meg reina, vakra og sunna, heilt inn í sálina. Og tað havi eg valt.